## Andras nýggjur stjóri í Smyril Line



1. september tekur Andras Róin, nevndarformaður í P/F Smyril Line, við sum stjóri í felagnum. Avtala er nú gjørd millum nevndina í P/F Smyril Line og nevndarformannin, Andras Róin, um at hann verður settur sum nýggjur stjóri í felagnum 1. september. Andras Róin, ið hevur verið nevndarformaður í felagnum síðani apríl 2006, hevur áður m.a. verið stjóri í P/F Føroya Tele í tíðarskeiðinum 1995 – 2006.

## Matvørurnar gerast dýrari

Methøgir prísir á matvørum eru í eygsjón. Hækkandi avgjald á eitt nú mjøl og meis eru atvoldin til, at dagligu matvørukeypararnir skjótt mugu síggja hægri prísir á matvørum sínum. Formennirnir í Irma, SuperBrugsen, Fakta pg Kohberg hava allir ávarað keypararnir móti hægri prísum.




**Kostnaður**
- Ein pers. pr. dag: **250 kr.**
- Tveir pers. pr. dag, fyri hvønn: **225 kr.**
- Tríggir pers. og fleiri pr. dag, fyri hvønn: **200 kr.**
- Undir 14 ár, men saman við vaksnum, ið hava goldið: **100 kr.**
- Størri bólkar og skúlaflokkar eftir avtalu

Agn: rækjur og makrelur fáast til keyps.

**Sílaveiða á Nesvatni**

Í Nesvatni er ein stovnur av smáum sílum, men til tess at skapa størri spenning, verða í fiskitíðini (mars-oktober) regluliga slept stór alabogasíl (2-5 kg), soleiðis at ein hóskandi nøgd av stórum sílum altíð er í vatninum.

**Meira fæst at vita á tlf. 447565 og 260887**


# Mentan úr trimum londum á einum staði

**Gongst sum Odense kommuna ætlar, verður eitt felags norðurlendskt mentanarhús tikið í nýtslu her um fá ár. - Vit hava longu fingið íslendskan og grønlendskan stuðul til ætlanina. Og nú vóna vit somuleiðis, at føroyingar vilja verða við, sigur Jan Boye, borgarstjóri í Odense**

**SAMSTARV**
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Klaksvík/Odense:** Í mong ár hevur Odense verið vinarbýur hjá Klaksvík. Sum skilst hevur hetta samstarvið verið báðum býum at gagni.

Nú er kortini líkt til, at hetta samstarvið verður víðkað munandi tey komandi árini, ikki bert millum býirnar báðar, men eisini við teir føroysku myndugleikarnar.

Ætlanin um eitt felags norðurlendskt mentanarhús í Odense hevur verið ávegis í eina tíð, men nú er arbeiðið komið so mikið langt, at hon verður løgd fram fyri stjórnirnar í londunum í Útnorðuri.

Í hesum døgum er nevniliga borgarstjórin Jan Boye og formaðurin Benny Nybo við fylgi á vitjan í Føroyum. Her skulu tey m. a. hitta varaløgmann og vinnumálaráðharra okkara, Bjarna Djurholm og tosa við hann um hesa ætlanina.

- Vit hava higartil møtt stórari vælvild. Grønlendingar stuðla hesum, og úr Íslandi hava vit longu fingið játtaðar 1 mió danskar krónur til byggingina, sigur borgarstjórin við Sosialin.

Í Odense er bæði eitt Grønlendingafelag, Íslendingafelag og eitt Føroyingafelag. Tí verður mett, at hetta er eitt rætt stað at leggja eitt slíkt mentanarhús.

### Útvega fígging

Mangir føroyingar hava lisið og lesa í hesum triðstørsta býnum í Danmark. Umframt teir 1000 føroyingarnar, sum eru búsitandi her, verður mett at fólk úr eini 150 londum búleikast her.

Tey seinastu árini hevur ein skipað fyri ymiskum mentanarligum tiltøkum í býnum. Saknur hevur allatíðina verið í einum einstøkum staði, har hesi tiltøk innan mentan, ferðavinnu og framsýningar av ymiskum slagi kundu savnast.

Í dag er støðan hon, at økið er fingið til vega á havnarlagnum í Odense, samstundis sum ein arbeiðir við at útvega fíggingina til ætlanina sum væntandi fer at kosta einar 100 mió krónur.

Umfram tann mentanarliga partin er ætlanin at húsið skal kunna húsa teimum lesandi, har verður matstova og annars alt ið hoyrir við til eitt slíkt hús.

- Vit vænta at spakin verður settur í jørðina í 2009, og síðani fara helst at ganga eini trý ár til húsið stendur liðugt, sigur formaðurin fyri húsið, Benny Nybo.

Við vitjanini í Føroyum er ætlanin at kunna um byggingina, eins og eitt føroyskt umboð skal veljast í stýrið fyri húsið.




*Tey eru komin til Føroyar at kunna um norðurlendska mentanarhúsið í Odense. Higartil hava tey bert møtt vælvild*
*Mynd: Jens Kr. Vang*


almannastovan
www.almannastovan.fo

**BÚSTOVNURIN SLÓÐIN SØKIR LEIÐARA**

Slóðin er bústovnur í Tórshavn, normeraður til 5 ung fólk undir 18 ár við sosialum, kensluligum ella sálarligum trupulleikum. Endamálið við stovninum er at geva teimum ungu umsorgan og mennandi umstøður, so tey í framtíðini við treysti megna at taka ábyrgd av egnum lívi.

Í løtuni starvast umframt leiðari 8 starvsfólk á stovninum.

Núverandi arbeiðsøkið hjá leiðaranum er, við tilvísing til stjóran á Almannastovuni, at hava ta dagligu ábyrgdina av bústovninum "Slóðin". Harafturat skalt tú samstarva við aðrar líknandi stovnar og onnur á nógvum økjum.

Stovnsøkið undir Almannastovuni fevnir um stovnar á barnaverndar- og brekøkinum. Tað er av stórum týdningi at stovnarnir alla tíðina laga seg til tørvin og eru við til at menna tilboðini, so at tey eru hóskandi til tann tørv, ið til eina og hvørja tíð er.

Vit kunnu bjóða tær eitt spennandi starv við nógvum og fjølbroyttum avbjóðingum og við møguleika fyri persónligari og fakligari menning.

Søkt verður eftir virkisfúsum persóni við viðkomandi útbúgving, so sum pedagogur, sosialráðgevi, sálarfrøðingur, ella líknandi.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Petru Johnsdóttir Joensen, stjóra, á tel. 353510.

Skrivlig umsókn saman við prógvi o.ø. skal vera Almannastovuni í hendi í seinasta lagi mánadagin 16. juli 2007, kl. 12.

Umsóknin skal sendast til: Almannastovan, Smyrilsvegur 20 Postboks 3096, 110 Tórshavn.

KREA.FO - TEL 47 80 80